gult cyan magenta svart



# Tolleftirlitið á flogvøllinum liggur lamið

**Fólk verða ikki kannað í sama mun sum fyrr, tá tey koma inn í landið um flogvøllin í Vágunum. Tolleftirlitið á flogvøllinum liggur meira ella minnið lamið vegna internar samstarvstrupulleikar, og tí er tað nógv lættari hjá ferðafólki nú enn fyrr at flyta ólógligar og tollskyldugar vørur inn í landið, eitt nú narkotika og lættari rúseitur.**

TOLLEFTIRLITSFRÍTT
*Rúnar Reistrup*



*Ferðafólkini, ið koma til Føroya um flogvøllin í Vágum, verða ikki longur kannað í sama mun sum fyrr*

*Mynd: Edvard Joensen*

Tolleftirlitið á flogvøllinum í Vágunum hevur ikki lagt hald á so mikið sum eitt gram av rúsevnum síðan mars mánað í fjør. At tað gongur so long tíð ímillum at rúsevni verða funnin á flogvøllinum, er óvanligt. Undan jólum varð einki ólógligt fýrverk funnið á ferðafólkunum, sum komu við flogfari til Føroya. Hetta er eisini óvanligt.

Fólk, sum eru komin við flogfari til Føroya farnu tveir mánaðirnar hava lagt til merkis, at tað ikki longur verður hugt í posarnar á ferðafólki, ið gongur ígjøgnum tollin. Tað var annars vanligt fyrr, at ferðafólk vórðu biðin um at vísa tollarunum nøgdina á tollfríum vørum á veg út.

## Samstarvstrupulleikar

Møguliga eru føroyingar blivnir væl skikkiligari seinasta árið, og møguliga eru fólk givin at flyta rúsevnir um flogvøllin. Og um so er, er hetta bert at frøast um.

Men orsøkin er helst ein heilt onnur, nevniliga tann, at ferðafólkini á flogvøllinum ikki longur verða kannað í sama mun sum fyrr, og at flogvøllurin í Vágunum í roynd og veru er blivin ein opin innflutningsvegur fyri rúsevnir og aðrar ólógligar ella tollskyldugar vørur.

At tolleftirlitið á flogvøllinum ikki er so gott sum tað hevur verið og eigur at vera, liggur fast. Fólk innan tolleftirlitið, bæði í Vágunum og aðrastaðni í landinum, vátta fyri Sosialinum, at tað eru álvarsamir samstarvstrupulleikar millum leiðsluna og tollararnar á flogvøllinum, og at hetta hevur havt við sær, at eftirlitið er viknað nógv. Løgreglufólk, sum í sínum dagliga arbeiði hava tætt samband við tolleftirlitini kring landið, viðganga eisini, at tað stendur ikki ov væl til við tolleftirlitinum á flogvøllinum.

## Tollararnir ónøgdir

Hesir samstarvstrupulleikarnir stava heilt afturi frá 1992, tá Føroya Tollstova var løgd saman við øðrum í nýggja stovnum Toll- & Skattstovu Føroya, men ikki fyrr enn í fjør góvu hesir trupulleikar rættiliga at bíta.

Tollararnir hava fingið boð um, at tann kanningarháttur, ið fyrr hevur verið nýttur, tá ferðafólk koma í land av flogfarinum, er ivasamur, og at fólk tískil ikki skulu kannast á sama hátt longur.

Hetta hevur sett eld í fjúsið hjá tollarunum, ið ikki kenna seg kunna gera sítt arbeiði til lítar. Av tí sama hava tollararnir valt at gera sum minst av kanningum, til teir aftur fáa greiðar heimildir at arbeiða eftir, skilst.

Hetta er ein ótolandi støða, bæði fyri tolleftirlitið, sum hevur sum eitt av sínum høvuðsendamálum at tálma innflutninginum av vandamiklum narkotiskum evnum, og fyri løgregluna, sum so at siga arvar trupulleikan í hinum endanum, tá hesi evni enda á gøtuni og elva til trupulleikar.

## Vilja ikki traðka fram

Men málið er eymt, og fólk hava ógvuliga lítlan hug at stinga hol á bløruna, og tí hevur eingin ynskt at traðka alment fram við tíðindunum um, at tolleftirlitið á flogvøllinum í Vágunum liggur at kalla lamið og hevur gjørt tað í longri tíð.

Og hóast sera greiðu ábendingarnar siga hvørki økisleiðarin fyri tolleftirlitið i Vágunum, Elsa Brimvík, ella stjórin á Toll- & Skattstovu Føroya, Óli Heinesen seg kenna nakað til nakrar samstarvstrupulleikar ella til, at tolleftirlitið ikki longur er so effektivt, sum tað burdi verið.

Økisleiðarin fyri tolleftirlitið í Vágunum, Elsa Brimvík, váttar, at ávísir samstarvstrupulleikar stungu seg upp eftir samanleggingina í 1992, men sigur seg ikki vita annað enn at hesir vórðu loystir og eru úti av verðini nú.

Og tíðindini um at tollararnir eru ónøgdir, sigur hon seg bert hava hoyrt sum leysatíðindi í fjølmiðlunum. Ikki frá øðrum.

Elsa Brimvík sigur seg vera vitandi um, at arbeiðsumstøðurnar hjá tolleftirlitinum ikki eru av teimum bestu, men sigur tað ikki vera komið henni fyri oyrað, at samstarvstrupulleikar eru í økinum, sum hon hevur ábyrgdina av.

## Stjórin einki hoyrt

Heldur ikki Óli Heinesen, stjóri á Toll- & Skattstovu Føroya, sigur seg kennast við nakrar samstarvstrupulleikar á tolleftirlitinum í Vágunum, og ei heldur um at tolleftirlitið virkar verri enn tað hevur gjørt.

– Tað er ikki so langt síðan at vit vóru vesturi á flogvøllinum, og tá fingu vit onga fráboðan um nakrar trupulleikar av nøkrum slag. Eru trupulleikar, so mugu tey, ið hava trupulleikarnar, venda sær til mín. Men tað hevur eingin gjørt enn, sigur Óli Heinesen.

Men at tað eru samstarvstrupulleikar innan tolleftirlitið á flogvøllinum, og at hetta eftirlit als ikki riggar, sum tað skal, hevur Sosialurin fingið váttað frá nógvum ymiskum keldum. Hetta fær tó ikki stjóran á Toll- & Skattstovuni at kanna málið.

– Har vóru ávísir trupulleikar á flogvøllinum, tá talið av tollarum fór úr 6 niður í 4 í 1993, men síðan tá hevur einki verið, sum eg havi hoyrt um. Eru trupulleikar, mugu starvsfólkini seta seg í samband við meg, sigur Óli Heinesen.

Hann váttar at tað er óvanliga langt síðan at hald er lagt á rúsevnir á flogvøllinum, men væntar ikki, at hetta kemst av vantandi eftirliti.

– Narkohundurin er jú javnan í Vágunum, og tað er aloftast hann, sum finnur tey rúsevni, sum verða funnin, sigur stjórin á Toll- & Skattstovuni.

## Tá hundurin er burtur

Eftir stendur, at annaðhvørt verða villeiðandi leysasøgur váttaðar av fleiri fólkum innan bæði tolleftirlitið og løgregluna, ella er samskiftið so mikið vánaligt á Toll- & Skattstovuni, at samstarvstrupulleikar kunnu leggja eftirlitið í einum eftirlitsøki at kalla lamið, uttan at hetta verður lagt til merkis av stovnsleiðaranum.

At narkohundurin enn arbeiðir sum hann plagar, burdi tryggjað, at narkotisk evnir ikki koma inn í landið við teimum flogførunum, sum lenda meðan hundurin er í Vágunum. Men hundurin hevur nógvar aðrar uppgávur, og tá flogvøllurin mestsum liggur sum ein opin innflutningsvegur hvørja ferð hundurin er burtur, er veruligur vandi fyri at nøgdin av innfluttum rúsevnum til Føroya stendur í blómandi vøkstri, meðan samstarvstrupulleikarnir verða tagdir burtur.



# Fær onga ávaring afturat

**– Vil Landsverkfrøðingurin ikki halda avtaluna um teir, sum rudda kava, fara teir hús, uttan orð ella boð**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

– Landsverkfrøðingurin fær onga ávaring afturat. Verður ikki friður nú, so verða vegirnir ikki ruddaðir, næstu ferð, tað fer at kava.

Sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Ósemja hevur aftur nú tikið seg upp ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Landsverkfrøðingin um arbeiðskorini hjá teimum, sum rudda kava av landsvegunum um veturin.

Seinasta vetur var um reppið, at ikki øll samferðsla eftir landi varð løgd lamin, tí at ósemja tók seg upp ímillum Landsverkfrøðingin og Føroya Arbeiðarafelag um korini hjá teimum, sum skulu rudda kava.

Men seinasta vár so varð sáttmáli gjørdur ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag um kavarudding, og so var friður.

Men friðurin vardi ikki leingi, tí hesin veturin er ikki meiri enn komin, so er aftur ósemja um kavaruddingina.

Føroya Arbeiðarafelag sigur, at Landsverkfrøðingurin vil ikki halda sáttmálan, sum varð gjørdur seinasta vár.

Hinvegin segði Landsverkfrøðingurin við Sosialin herfyri, at teir hildu sáttmálan í odd og egg.

Eitt ávíst samskiftið hevur verið ímillum partarnar um sáttmálan, men tað hevur ikki ført til nakað.

Og nú hevur Føroya Arbeiðarafelag fingið nokk.

Ingeborg Vinther ger púra greitt, at nú verður ikki meiri tosað, ikki meiri samráðst og ikki fleiri brøv skrivað.

– Vil landsverkfrøðingurin ikki halda avtaluna, verða menninir, sum rudda kava, sendir heim. Og so verða ongir vegir ruddaðir, sigur hon.

Hetta varð nevndin í Føroya Arbeiðarafelag samd um á fundi týsdagin.

Næstu ferð, tað fer at kava, fáa vit so at síggja, hvussu vorðið verður.

Tað er onki at ivast í, at verður ongin kavarudding , fer tað at fáa álvarsligar avleiðingar fyri alla samferðslu á landi, tí legst nakað av kava, fær ongin koyrt, uttan av vegirnir eru ruddaðir. Umframt at rudda kava, ger Landsverkfrøðingurin eisini eitt stórt arbeiði at stroya sand og salt á vegirnar, tá ið tað er hált. So tilsamans hava teir, sum rudda kava, eisini stóran týdning fyri ferðslutrygdina, umframt at teir halda vegirnar opnar.



*Næstu ferð at tað fer at kava, er tað ein stórur spurningur, um menninir hjá Landsverkfrøðinginum verða at síggja úti á vegunum og rudda kava*

## Ósemja um tilkalling

Tað skilst at tað serliga er í samband við tilkallivaktir, at ósemja hevur tikið seg upp.

Arbeiðsmenninir, sum rudda kava, fáa løn fyri at vera tøkir, tá ið teir hava tilkallivakt. Tað, sum ósemjan ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Landsverkfrøðingurin, er um, er, hvussu hendan reglan í sáttmálanum skal tulkast.

Landsverkfrøðingurin sigur, at hann vil sjálvur gera av, nær tað er neyðugt at menninir eru tøkir. Ingeborg Vinther sigur, at tað stutta av tí langa er, at Landsverkfrøðingurin vil sleppa undan at betala tilkallingina.

Landsverkførðingurin hevur áður sagt, at teir eru sinnaðir at halda sáttmálan. Men er Føroya Arbeiðafelag ósamt við mátanum, sum Landsverkfrøðingurin tulkar sáttmálan, má felagið venda sær til Føroya Arbeiðsgevarafelag, tí tað er arbeiðsgevarafelag, sum hevur sáttmálan.

Men Ingeborg Vinther sigur altso nú, at menninir verða tiknir heim uttan ávaring, um avtalan ikki verður hildin.

– Tað hevur verið so nógv stríð av hesum sáttmálanum, at nú hava vit mist tolið, so menninir verða heilt einfalt tiknir heim uttan aðra ávaring, næstu ferð vit fáa boð um, at avtalan ikki verður hildin, sigur hon.

# Fingu 6% meiri í løn

**– Verkfallið hjá bussførarunum í Suðuroynni var ikki nyttuleyst, hóast vit ikki fingu tað, sum vit vildu hava, sigur Uni Mortensen**

BUSSKOYRING
*Áki Bertholdsen*

Í gjáramorgunin var busskoyringin hjá Bygdaleiðum í Suðuroynni tikin uppaftur sum vanligt, eftir at hon hevur ligið still í eina viku.

Tað var mitt í farnu viku, at bussførarnir í Suðuroy fóru í verkfall, tí teir kundu ikki semjast um ein nýggjan sáttmála við Strandferðsluna.

Teir sjey bussførararnir í Suðuroynni eru annars limir í Bussfelagnum. Sáttmálin gekk út á nýggjárinum, men í samráðingunum ímillum Strandferðsluna og Bussfelagnum var semja um at útseta eitt møguligt verkfall til 1. februar og at samráðast til tá.



*– Bussførararnir í Suðuroynni hava ásannað, at teir koma helst ikki longri í hesum umfarinum. Tí endaðu teir verkfallið og fóru at koyra aftur í gjáramorgunin, eftir at bussarnir hava staðið stillir í eina viku*

Men suðuroyingarnir tóku serstøðu og fóru verkfall mitt í farnu viku

So hendi tað fríggjakvøldið, at Strandferðslan og Bussfelagið samdust um at leinga sáttmálan, sum er í gildið, í eitt ár afturat, til 31. desember. Harafturat vóru nakrar batar gjørdir í sáttmálanum.

Bussførarnir í Suðuroynni fingu somu treytir sum Bussfelagið, men tað var ikki líkt til, at teir fóru at taka av, tí teir vildu hava nýggjan sáttmála.

Men síðani hava teir so broytt meining og hava samtykt at góðtaka, at sáttmálin verður longdur fram til 31. desember.

Sostatt varð busskoyringin í Suðuroy tikin uppaftur sum vant í gjáramorgunin.

Hinir limirnir í Bussfelagnum skulu taka støðu til sáttmálan á limafundi í kvøld.

## Ikki nyttuleyst

Tað kom nokk so óvæntað, at bussførarnir í Suðuroynni fóru at taka av tilboðnum um at leingja sáttmálan fram til 31. desember tí teir høvdu lagt út við størri krøvum enn so. M.a. vístu teir á, at teir, sum koyrdu buss í miðstaðarøkinum fáa munandi meiri løn enn teir, sum koyra kring landið, Teir vildu eisini hava reglar um hvílitíð.

Tað skilst eisini á Una Mortensen, at bussførararnir í Suðuroynni vóru ikki samdir um at leingja sáttmálan eitt ár afturat.

– Tað er meirilutin, sum ræður. Og meirilutin gjørdi av at leingja sáttmálan, so soleiðis verður tað, sigur Uni Mortensen, sum hevur verið talsmaður hjá teimum sjey bussførarunum í Suðuroynni.

Hann sigur, at hann vónar bara, at næstu ferð, samráðingar verða, fer tað at vera størri samanhald í Bussfelagnum og at eisini bussførararnir norðanfjørðs duga at síggja tað órímiliga í, at bussførarar í Havn fáa væl meiri í løn, enn teir, sum koyra úti um landið.

Hann leggur tó dent á, at verkfallið hjá bussførarunum í Suðuroynni var als ikki nyttuleyst.

– Tað var helst tí, at vit fóru í verkfall, at tað hóast alt eru komnir nakrir batar í sáttmálan, sum nú er longdur til 31. desember.

– Eitt nú er lønmin hækkað 6%. Harafturat hava bussførarnir fingið 60 oyru í umvælingargjaldi fyri hvønn kilometur, bussarnir koyra.

Hóast Uni Mortensen heldur, at hetta er alt ov lítið, vónar hann, at fleiri batar kunnu gerast á sáttmálan næstu ferð.

Hann leggur eisini dent á, at busførararnir í Suðuroy eru framvegis limir í bussfelagnum, hóast teir tóku serstøðu í hesum málið.

– Nú er gerandisdagur aftur. Hetta málið er avgreitt og so gingur lívið víðari, sigur Uni Mortensen.